# Alonso vann aftur



*Leingi var Michael Schumacher einasta hóttanin hjá Alonso, men heimsmeistarin mátti gevast við tøkniligur trupulleikum*
*Mynd: Reuters*

**Ungi spaniumaðurin Fernando Alonso koyrdi fyrstur úm málstrikuna í formel 1 koyringini í Bahrain. Aftaná at einasta hóttanin: sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher varð noyddur at steðga við tøkniligum trupulleikum, var ongantíð veruliga hóttur á veg til sigurin**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*

Koyringin var óvanliga spennandi og fyrstu 12 umførini lógu Alonso og Schumacher við undir einum sekundi í frástøðu. Og nógvar kappingar vóru í kappingini. Eitt nú, var Barrichello sera sannførandi, hann koyrdi av aftasta plássið og heilt upp í stigini. Hetta gav nógvar og góðar yvirhálingar, áðrenn Barrichello eisini fekk tekniskar trupulleikar og spakuliga datt aftur úr stigunum.

Bert góðu avkoyringarmøguleikarnir í Bahrain bjargaðu Michael Schumacher frá eini vanlukku, tá bilurin í nógvari ferð fekk tekniskar trupulleikar. Michael Schumacher koyrdi beint í pit har hann steðgaði.

Jarno Trulli í Toyota fekk annað pláss, við enn einari sannførandi Toyota framførslu. Kimi Raikkonen í McLaren/Mercedes gjørdist nummar trý.

Hin Toyota koyrarin Ralf Schumacher vísti, at hann eisini dugur at fáa sín bil í stigini, og gjørdist nummar fýra.

Eisini avloysarin í McLaren-Mercedes fyri skadda Juan Pablo Montoya, spaniumaðurin Pedro de la Rosa koyrdi eina rimmar koyring. Við nógvum yvirhálingum fekk hann eitt sera heiðurligum fimta plássi. Mark Webber í Williams-BMW stríddi sær eitt sætta pláss. Felipe Massa koyrdi fyrstu stigini í hús fyri Sauber-Petronas á sjeynda plássi, meðan David Coulthard fekk eitt stig á áttanda plássi.

## Støður, Formel 1

### Koyrarar

| Navn | Land | Merki | Stig |
|---|---|---|---|
| Fernando Alonso | Spania | Renault | 26 |
| Jarno Trulli | Italia | Toyota | 16 |
| Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 10 |
| David Coulthard | Stórabretland | Red Bull | 9 |
| Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 9 |
| Rubens Barrichello | Brasil | Ferrari | 8 |
| Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren | 8 |
| Kimi Raikkonen | Finnland | McLaren | 7 |
| Mark Webber | Australia | Williams | 7 |
| Nick Heidfeld | Týskland | Williams | 6 |
| Pedro de la Rosa | Spania | McLaren | 4 |
| Christian Klein | Eysturríki | Red Bull | 3 |
| Michael Schumacher | Týskland | Ferrari | 2 |
| Felipe Massa | Brasil | Sauber | 2 |

### Bilar

| Merki | stig |
|---|---|
| Renault | 36 |
| Toyota | 25 |
| McLaren | 19 |
| Wiliams | 13 |
| Red Bull | 12 |
| Ferrari | 10 |
| Sauber | 2 |

## Úrslitið í Bahrain

| | Koyrari | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | 1.29.18,531 |
| 2 | Jarno Trulli | + 13,4 sekund |
| 3 | Kimi Räikkönen | + 32,0 sekund |
| 4 | Ralf Schumacher | + 53,2 sekund |
| 5 | Pedro de la Rosa | + 64,9 sekund |
| 6 | Mark Webber | + 74,7 sekund |
| 7 | Felipe Massa | 1 umfar |
| 8 | David Coulthard | 1 umfar |
| 9 | Rubens Barrichello | 1 umfar |
| 10 | Tiago Monteiro | 2 umfør |
| 11 | Jacques Villeneuve | givin |
| 12 | Patrick Friesacher | 3 umfør |
| 13 | Christijan Albers | 4 umfør |
| 14 | Jenson Button | givin |
| 15 | Takuma Sato | givin |
| 16 | Nick Heidfeld | givin |
| 17 | Michael Schumacher | givin |
| 18 | Giancarlo Fisichella | givin |
| 19 | Narain Karthikeyan | givin |
| 20 | Christian Klien | givin |

# Villeneuve undir trýsti



**Jacques Villeneuve er veruliga undir trýsti, slaturin gongur í formel 1 verðini, um at hann skjótt verður útskiftur í Sauber liðnum**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*

Fyrrverandi heimsmeistarin hevur ikki liva upp til vónirnar, sum Sauber liðið høvdu til hann. Hann er støðugt verri enn ungi liðfelagin Felipe Massa. Talan er ikki um lítlan mun, men hann verur avsmurdur. Hetta vikuskiftið var møguliga síðsti møguleiki hjá kanadiumanninum at vísa, at hann enn er skjótur. Hetta gekk tó ikki betur enn næstbest: Hann var 2,5 sekund aftan fyri liðfelagan í tíðarkoyringini, og gjørdi lítið hóvasták burturúr sær í sjálvari koyringini. At enda rendi hann saman við Rubens Barrichello, og sostatt endaði eitt ræðuligt vikuskifti, og kanska ein formel 1 yrkisleið.

## Frálíkt Fernando!

**Fernando Alonso er einans 23 ár, men sær í løtuni út sum eitt gott boð uppá ein komandi heimsmeistara**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*

At Fernando Alonso fekk triðja pláss í fyrstu koyringini og hevur vunnið aðru og triðju koyring í ár, er sjálvandi ikki orsøk at rópa hann heimsmeistara. Hann hevur 26 stig, tað bert 10 stig fleiri enni Jarno Trulli í Toyota sum gerst alt skjótari.

Enn eru 16 koyringar eftir, so nógv kann henda. Men mátin, sum Alonso hevur vunnið, er sera sannførandi. Bæði í Malaysia og í Bahrain hevur hann verið í fyrstu byrjunarstøðu og á odda alla koyringina. Trulli hevur ongantíð veruliga avbjóða honum, sjálvt um hann hevur fingið annað pláss báðu ferðirnar.

Renault bilurin er frálíkur í ár og tí er versti kappingarneytin ivaleyst liðfelagin Giancarlo Fisichella. Fisichella vann í Avstralia, men er ikki komin á mál tvær tær seinastu koyringarnar, og hevur ikki sæð sannførandi út síðan Melbourne.

Eisini vanligi vinnarin sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher er ein avbjóðari, og nýggi Ferrari bilurin F-2005, er sera skjótur. Men við øllum teimum tekniskum trupulleikunum Ferrari hava havt hetta vikuskiftið, er spurningurin um heimsmeistaraheitið er tapt, áðrenn F-2005 regluliga kemur á mál.